# Ert tú leiðarin, vit leita eftir ?

Søkt verður eftir deildarleiðarum til deildir okkara í Vestmanna og Fuglafirði

Deildirnar hava sum høvuðsendamál at taka sær av dagliga kundaviðskiftinum á økinum.

**Uppgávur:**
- daglig leiðsla og skipan av arbeiði á deildini
- skapa eitt mennandi og avbjóðandi arbeiðspláss
- tryggja at ráðgevingin og tænastan eru á høgum støði
- útinnan av kredittmetingum
- uppfylging av deildarroknskapi og fíggjarætlan
- umframt aðrar uppgávur álagdar av stjórnini

**Førleikakrøv:**
- Peningastovnsútbúgving við "Finansiel Videreuddannelse" ella HA, HD, Bachelor ella aðra viðkomandi útbúgving
- góðan kunnleika til EDV
- duga at málbera seg í skrivt og talu

Umsøkjarar, ið hava peningastovnsroyndir og/ella leiðararoyndir hava fyrimun.

**Persónligir eginleikar:**
- duga at arbeiða sjálvstøðugt og tora at taka avgerðir
- hava góð evni at umstilla seg í einum broytiligum umhvørvi
- hava góð samstarvsevni og evni at leiða ein bólk í einum kravmiklum umhvørvi

Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg fakliga og persónliga.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Steinbjørn Hardlei, starvsfólkaleiðara, tel. 348000.

Løn og eftirløn verða ásett eftir nærri avtalu.

Umsókn, saman við viðkomandi skjølum, skal verða Føroya Sparikassa í hendi í seinasta lagi 11. juni 2001, og sendast til:

Føroya Sparikassi
att.: Starvsfólkaleiðarin
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
Starvsfólkadeildin, Yviri við Strond 2, FO-100 Tórshavn
E-post: Starvsfólkadeildin@sparikassin.fo www.sparikassin.fo

Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið, ið serliga fáast við at veita ráðgeving, fígging og selja tænastur Sparikassans.



KIRKJUBØAR KOMMUNA

# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða á stovu við 2-5 ára gomlum børnum.
Nær: At byrja 1. august (ella eftir avtalu)
Arbeiðstíð: 35 tímar um vikuna (ella eftir avtalu)
Løn og arbeiðsviðurskifti eftir sáttmálanum hjá Føroya Pedagogfelag.

**Í Barnagarðinum á Velbastað** eru 40 børn millum $^1/_2$ og 9 ár.
Tey eru í 3 aldursbýttum stovum: 0-2 ár, 2-5 ár og 5-9 ár.

Barnagarðurin er í friðarligum umhvørvi, næstan í haganum. Børnini eru úr Kirkjubø, av Velbastað og úr Havn. Tað tekur eitt korter at koyra úr Havn, og eisini ber til at koyra við bygdaleiðum.

Vit vænta, at tann, sum verður sett/ur í starv
- dámar væl at vera úti í náttúruni
- sær uppgávur sum avbjóðingar og ikki sum trupulleikar
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni
- vil vera við til at seta sín dám á stovnin

Umsókn við prógvi og møguligum viðmælum skal vera barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 30. juni. Um eingin pedagogur verður settur í starv, hava vit hjálparfólk.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Barnagarðin á tlf. **31 81 21** og spyrja eftir leiðaranum.

**Barnagarðurin á Velbastað**
FO-176 Velbastað
velbarn@post.olivant.fo





# Stóra bringu
## -ella lítla?

**Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-støðd?**

**Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína støðd.**

Sosialurin - 31 1820

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

SIRI
liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610



# Fólk søkist til Bakaríið hjá Símun

Vit sóknast eftir hjálparfólki til bakaríið at byrja skjótast gjørligt.

# Lærlingur til Bakaríið

Hevur tú hug til at arbeiða á spennandi fjølbroytt-um arbeiðsplássi, so hava vit eitt læruplás til tín.

**Bakaríið**
hjá Símun
Tlf. 456424 ella 455032
box 299
700 Klaksvík



Lesið
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
-tað loysir seg



M/B Barsskor

# KALLSOYARLEIÐIN

## Broyting í ferðaætlanini

Frá fríggjadegnum 1.juni 2001, fer Barsskor at sigla til Syðradals seinnu túrarnar fríggjadag og túrarnar leygar- og sunnudag.

Til hesar túrar verður fráferðin hjá Barsskor úr Klaksvík flutt framm soleiðis:

| | Gomlu tíðirnar | Nýggju tíðirnar |
|---|---|---|
| Fríggjadag | kl. 17.15 | 17.30 |
| | kl. 20.15 | 20.30 |
| Leygardag | kl. 08.50 | 09.00 |
| | kl. 15.45 | 16.00 |
| Sunnudag | kl. 15.45 | 16.00 |
| | kl. 20.15 | 20.30 |

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum / Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um*





# Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi til Verkhúsið Stíggj í Saltangará frá 13.08.01. til 30.04.02, møguliga longri.

Talan er um eitt hálvtíðarstarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki11/17. Arbeiðstíðin kemur at vera aðru hvørja viku frá kl. 8.00-16.00.

Verkhúsið Stíggjur er ein dagstovnur undir Almanna og Heilsumálastýrinum. Har vit í einum vælskipaðum umhvørvið geva fólki, sum vegna sína kroppsligu- ella sálarligu støðu ikki kunnu røkja eitt vanligt arbeiði, møguleika at arbeiða við ymiskari framleiðslu av vørum. Somuleiðis stuðla til sjálvbjargni innan hettar arbeiðsøki.

Vit vænta at umsøkjarin
- luttekur í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan
- er tolin og dugir at læra frá sær
- er røkin og dugir at leggja arbeiðsuppgávurnar til rættis eftir førimuni hjá arbeiðsfólkunum
- sær týðningin av góðum samstarvi, og sjálvstøðugt kann seta ígongd og skipa fyri virksemi bæði innan- og uttandurða.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til leiðaran á tlf. 448944.

Hevur tú hug og áræði at royna teg á einum virksomum arbeiðsplássi, so send okkum eina umsókn.

Umsóknarfreistin er 15.06.2001 og skulu umsóknirnar, saman við prógvi, viðmælum v.m. sendast til

**Verkhúsið Stíggjur**
Heiðavegur
FO-600 Saltangará
Att. leiðarin



# TILKOMIÐ FÓLK til Griffilin

**Søkt verður eftir tilkomnum fólki at arbeiða hálva tíð**

Vit sóknast eftir fyrikomandi, ágrýtnum fólki, sum dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiðstíðin er aðruhvørja viku fyrrapart, aðruhvørja viku seinnapart og annaðhvørt vikuskifti.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan handil, men hetta er tó eingin treyt.

Tú kanst byrja eftir nærri avtalu, tó í seinasta lagi 1. august.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Kára Justinussen á tel 310840 ella 210840.

griffilin
SMS



**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

Niðanfyri nevndu lærarastørv eru leys at søkja til setanar 1. august 2001.

**Norðoya skúladømi I:** Klaksvíkar, Hvannasunds, Viðareiðis og Kunoyar kommunur:
Klaksvíkar kommuna:
*Skúlin við Ósánna* — 3 lærarar
*Skúlin á Ziskatrøð* — 1 lærari
Kunoyar kommuna: — 1 einalærara

**Fugloyar kommuna:** — 1 útoyggjalærari

**Eysturoyar skúladømi I:** Fuglafjarðar, Gøtu og Leirvíkar kommunur:
Fuglafjarðar kommuna: — 3 lærarar

**Eysturoyar skúladømi II:** Skála, Sjóvar, Oyndafjarðar, Runavíkar og Nes kommunur:
Sjóvar kommuna: — 1 lærari
Runavíkar kommuna: — 3 lærarar
Nes kommuna: — 1 lærari

**Eysturoyar skúladømi III:** Kommunurnar, ið eru saman um Felagsskúlan á Oyrarbakka:
Eiðis kommuna: — 1 lærari
Funnings kommuna: — 1 einalærari

**Streymoyar skúladømi I:** Vestmanna og Kvívíkar kommunur:
Vestmanna kommuna: — 2 lærarar

**Streymoyar skúladømi II:** Kommunur, ið eru saman um Felagsskúlan á Oyrarbakka:
Hvalvíkar kommuna: — 1 lærari

**Streymoyar skúladømi III:** Tórshavnar, Nólsoyar og Kirkjubøar kommunur:
Tórshavnar kommuna:
*Kommunuskúlin:* — 4 lærarar
*Eysturskúlin:* — 5 lærarar
*Sankta Frans skúli:* — 1 lærari
*Argja skúli:* — 3 lærarar
*Hoyvíkar skúli:* — 1 lærari
Nólsoyar kommuna: — 1 lærari
Kirkjubøar kommuna: — 1 lærari

**Vága skúladømi:**
Sørvágs kommuna: — 1 lærari

**Sandoyar skúladømi:**
Sandoyar Meginskúli — 1 lærari

**Suðuroyar skúladømi I:** Upptøkuøkið til 8.–10. flokk í norðari helvt:
Hvalbiar kommuna:
*Hvalbiar skúli* — 1 lærari
Tvøroyrar kommuna: — 1 lærari

**Suðuroyar skúladømi II:** Upptøkuøkið til 8.–10. flokk í sunnari helvt:
Vágs kommuna: — 1 lærari

Har einki tímatal er viðmerkt, verður roknað við fullum tímatali.

***Førleikakrøv***
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum, Fólkaskúladeildin, við starvsstaði í nevnda skúladømi og við fyribils tænastu í nevnda skúla/nevndu skúlum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

***Umsóknir***
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal verða send Mentamálastýrinum, Hoyvíksvegur 72, postrúm 3279, 110 Tórshavn, skjótast til ber og soleiðis, at hon er Mentamálastýrinum **í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni 2001**. Við umsóknini eiga at verða løgd lýsing av prógvum og møguligum viðmælum.

Teir umsøkjarar, ið søkja størv í fleiri kommunum, mega skriva eina umsókn til hvørt starv, ið søkt verður.

Tórshavn, 30. mai 2001

Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 – 110 Tórshavn
Telefon 355050 – Fax 355055 – e-postur: MMS@MMS.fo

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*